## Toyota loysnir hjá tí almenna



Knud Sant, professari á "Danmarks Tekniske Universitet", sigur við Berlingske Tidende, at tænastan hevði verið nógv betri um t.d. kommunur, sjúkrahús og politiið brúktu kendu "Leanmetoduna" hjá Toyota, tí so høvdu allar málsviðgerðir verið skjótt og effektivt avgreiddar

*Kelda: Motor Magasinet*

## Hyundai nr. 5.000



Teir 57 donsku Hyundai bilhandlararnir seldu síðst í november bil nr. 5.000 í ár. Hetta hendir hóast samlaða bilasølan í Danmark er minkað við 16 prosentum í mun til 2002. Serliga er tað Hyundai Getz, sum eigur sín stóra part í sølumetinum

*Kelda: Motor Magasinet*

## Saab 9-7X



Saab Automobile AB fara at koma við nógvum nýggjheitum í nærmastu framtíð. Ein av teimum er Saab 9-7X, sum verður teirra fyrsti 4x4 frítíðarbilur, sum serliga er ætlaður til USA og Kanada

*Kelda: Motor Magasinet*

Audi A8 6.0 W12:

# Luksus dreymabilur úr aluminium



*Audi A8 innan. Har er alt ein kann ynskja sær. Tað er lættari at skriva, hvat hann ikki hevur av útgerð*



*Audi A8 er ein sportligur luksusbilur við karossarii úr aluminium*

**Nú Audi eru komnir fram við sínum nýggjasta A8 við 6,0 litur við 12 sylindarum hava teir lagt seg á odda í kappingini um at gera heimsins mest sportsligu luksuslimousinur. A8 hevur aluminiumskarossarí**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*



*Motorurin er ein W12 - 6.0 litur og 450 hk, sum koyrir frá 0-100 km/t upp á 5,2 sek*



*A8 er fyrsti Audi við nýggja stílinum, sum kemur at eyðkenna Audi bilarnar í nærmastu framtíð*

Øll hava loyvi at droyma. Hesin Audi A8 verður ivaleyst verandi við dreymin hjá flest øllum. Bilurin kostar næstan hálvatriðju millión at keypa í Danmark.

Hóast bilar í hesum stóra luksusklassanum ikki koma hendan vegin, kann tað vera áhugavert at vita, hvussu teir síggja út.

A8 er toppmodellið hjá Audi og bilurin hevur so avgjørt útsjóndina við sær. Hann er fyrsti Audi við nýggja designinum, sum kemur at eyðkenna Audi bilarnar í nærmastu framtíð, serliga er tað kølaragittari, sum er stórt og massivt og fer niður í millum forkúfangaran.

Karossaríið er úr aluminium, og bilurin er bygdur upp eftir "Audi Space Frame" konseptinum, sum gevur sera lága vekt, hóast bilurin er stórur. A8 hevur elektroniska luftfjaðraskipan, sum alla tíðina lagar seg til koyriumstøðurnar hjá bilinum. Fjaðraskipanin kann eisini stillast soleiðis at bilurin kann verða harður og sportsligur um man ynskir tað ella so komfortabul, sum hugsast kann.

6,0 litur W12 motorurin við 450 hk er ein uppliving í sær sjálvum. Hann koyrir frá 0-100 km/t upp á 5,2 sek. Bilurin er ein Quattro við permanentari fýrahjóldrift.

Alfa Romeo 166:

# Elegantur sportsligur luksusbilur



*Alfa Romeo 166 er ein elegantur sportsligur luksusbilur við motorum upp til 3,0 litur V6 við 240 hk*

**Alfa Romeo 166 er ein elegantur sportsligur luksusbilur, sum nú hevur fingið nýtt design. Bilurin fæst við motorum upp til 3,2 litur V6 og 240 hk og sum diesel**

BILAR
*Magnus gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Vit kunnu ikki siga, at italsku Alfa Romeo bilarnir mynda vanligu gøtumyndina á føroysku vegunum. Teir gera fleiri ymisk modell so sum Alfa Romeo 147, 156 og 166 umframt onnur sportsmodell sum GTV og Spider. Størstur er 166, sum er ein sannur luksusbilur í dýrara klassanum.

Nýggjasta útgávan av Alfa Romeo 166 hevur ta útsjóndina, sum er vorðið eitt sereyðkenni fyri Alfa Romeo, við kølaragittaranum sum fer niður ímillum forkúfangaran. Annarleiðis og smart. Bilurin fæst við fýra ymiskum bensinmotorum og einum 2,4 litur multijet dieselmotori við 175 hk. Bensinmotorarnir byrja við einum 2,0 litur við 150 hk, síðan er ein 2,5 litur V6 og ein 3,0 litur V6 24V við 240 hk.

Alfa Romeo er eru kendir sum sportsligir bilar við stórum motorum og sera góðum koyrieginleikum. 166 stendur onki aftanfyri aðrar evropeiskar bilar í sama klassa. Í Danmark kostar ein Alfa Romeo 166 umleið hálva millión krónur, alt eftir motorstødd og útgerð.



ÁRSINS ENDABRESTUR!



Í BRÚKTBILAMARKNAÐI



– SPAR UPP Í 25.000,- UPPÁ HESAR!







NÅR ENDEN ER GOD
– ER ALTING GODT!

DANAK Reg.nr. 5001 Kvalitetsstyringssystem certificeret i henhold til DS/EN ISO 9001:2000 af Det Norske Veritas, Danmark A/S

VÆLKOMIN TIL

CITROËN DaimlerChrysler MITSUBISHI MOTORS

Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo